UTTAN ÚR HEIMI

# Vaktarskifti í Danmark

**Sum eina seinastu roynd at varðveita sessin lovar Poul Nyrup Rasmussen dønum skattalætta. Men nú er ov seint**

ÚTLAND:



Meðan teir borgarligu floksformenninir undir valstríðnum hava lovað skattasteðg og skattalætta, hava formenninir í stjórnarflokkunum hildið fast um verandi skatt. Men tá forkvinnan hjá Radikala Vinstra, búskaparráðharrin Marianne Jelved, um vikuskiftið mælti til tað, hon kallaði skattaumskipan, kendi forsætisráðharrin seg noyddan at taka táttin upp.

Í einum floksformansorðaskifti í sjónvarpinum sunnukvøldið segði Poul Nyrup Rasmussen, at sosialdemokratarnir eru sinnaðir at hyggja at skattatrýstinum, fáa teir myndugleika til tess eftir valið. Hann vildi tó ikki lovað skattalætta beinanvegin, men helt, at heldur verandi búskapargongd fram, eigur spurningurin at verða umhugsaður seint í næsta valskeiði.

Hetta fekk alt fyri eitt mótstøðumann hansara, Vinstraformannin Anders Fogh Rasmussen, at vísa á, at sambært stjórnaruppskotinum til fíggjarlóg fyri 2002 skulu danir rinda tvær mia. krónur afturat í skatti næsta ár. Hóast hann tvær reisur spurdi forsætisráðharran, hvør skuldi rinda hendan eyka skattin, fekk hann ikki svar.

Orðaskiftið, sum var tað seinasta upp undir valið, snúði seg annars fyri tað mesta um sjúkrahúsverkið, viðurskiftini hjá teimum eldru og innflytararnar.

### Greiður borgarligur meiriluti

Tær seinastu veljarakanningarnar vísa eins og frammanundan, at teir borgarligu flokkarnir fara at vinna greiðan meiriluta í dag, og at Anders Fogh Rasmussen skal taka við eftir Poul Nyrup Rasmussen.

Ein samandráttur av teimum seinastu kanningunum gevur Vinstra, Konservativa Fólkaflokkinum og Danska Fólkaflokkinum 93 tinglimir, meðan stjórnarflokkarnir og teirra stuðulsflokkar fáa 77 umboð í Fólkatingið.

Sambært samandráttinum verður Vinstri størsti flokkur við við 32,3 prosentum av atkvøðunum, sum geva flokkinum 58 fólkatingsumboð. Sosialdemokratarnir fáa 29,9 prosent og 52 tinglimir. Triðstørsti flokkur verður Danski Fólkaflokkurin við 19 tinglimum, og Konservativi Fólkaflokkurin fær sambært samandráttinum 16 umboð á Fólkating.

Hetta bendir sostatt á, at Danmark fær eina borgarliga stjórn, sum verður sett saman av Vinstra og Konservativa Fólkaflokkinum við Danska Fólkaflokkinum sum stuðulsflokki. Undan valinum varð nevndur møguleikin at skipa eina fýra-flokka stjórn við Vinstra, Konservativa Fólkaflokkinum, Centrumsdemokratunum og Kristiliga Fólkaflokkinum, men tað letur seg ikki gera nú, tí Danski Fólkaflokkurin vil ikki taka undir við einari tílíkari stjórn. Harafturat vísa seinastu kanningarnar, at Centrumsdemokratarnir fáa ikki umboð í nýggja Fólkatingið.

*(Fartekst)*




# Friðarfundur um Kekenia

Fyri fyrstu ferð síðani Russland fór upp í kríggið í Kekenia í 1999, eru partarnir farnir at samráðast um frið.

Samráðingar byrjaðu í Moskva sunnudagin, tá ein umboðsmaður hjá kekenska uppreistrarleiðaranum Aslan Maskadov hitti ein umboðsmann hjá Vladimir Putin, forseta. Endamálið við fundinum er sambært tíðindastovuni Itar-Tass at fáa enda á bardøgunum, sum nú hava vart í 25 mánaðir uttan íhald.

Hvørki stjórnin í Moskva ella kekenska uppreistrarrørslan vildi vátta tíðindini um fundin millum kekenska sendimannin Akhmed Sakajev og serliga sendimannin hjá Putin, Viktor Kasantsev.

Vladimir Putin mælti longu í summar til samráðingar, og tá var ætlanin, at partarnar skuldu hittast tann 24. september, men yvirgangsatsóknirnar í USA gjørdu, at tann fyrsti fundurin varð útsettur.

Russiskar hernaðarkeldur halda, at bardagarnir í Kekenia hava kostað næstan 15.000 mannalív.






Ung fremja grovan harðskap:

# Brákaði ryggjargeisla eftir álop

**Tveir tilburðir við grovum harðskapi hava verið í Havn um vikuskiftið. Ein tilkomin maður brákaði ein ryggjargeisla og breyt fleiri ryvjabein, eftir at hann varð álopin av fleiri blaðungum. Fimm eru higartil skuldsett**

HARÐSKAPUR
*Stefan í Skorini*

Eftir nøkur friðarlig vikuskifti hevði løgreglan aftur um at vera farna vikuskiftið. Heili tvey álop, har talan var um ógvuliga grovan harðskap, vórðu framd náttina til leygardagin. Báðir fóru fram í miðbýnum, og talan var um tilkomnar menn, sum vórðu álopnir av blaðungum fólki. Teir báðir hava fingið stóran skaða eftir álopini.

Tann eini tilburðurin fór fram við bakaríið hjá Frants Restorff stutt eftir midnáttarleitið. Ein maður, sum er um 40 ára gamal, varð álopin av einum hópi av blaðungum fólki. Bólkurin nærkaðist manninum og spurdi, um hann var ein av náttarravnunum, sum ganga og sneyta í býnum. Maðurin svaraði noktandi, at tað var hann ikki.

Hann verður tó sligin niður, og so leggja øll tey ungu á hann, meðan hann liggur niðri á vegnum. Har eru bæði gentur og dreingir, sum sparka og sláa mannin, so at hann fær kropsligt mein.

Maðurin varð fluttur á landssjúkrahúsið til viðgerðar. Dagin eftir boðar hann løgregluni frá tilburðinum, og hann verður avhoyrdur.

### Brákað ryggjargeisla

Maðurin hevur brákað ein ryggjargeisla, og hann hevur brotið fýra ryvjabein. Alt andlitið er ógvuliga hovið, og bæði eyguni eru bláð.

Løgreglan metir henda tilburðin sum sera grovan harðskap, og hon er komin ógvuliga væl áleiðis við hesum málinum. Álopið er framt heilt uttan endamál, og maðurin hevði eftir øllum at døma einki gjørt fyri at leggja upp til hetta álopið.

Løgreglan hevur avhoyrt eini níggju fólk, sum øll eru í aldrinum 14-15 ár. Fyribils eru fimm av hesum skuldsett fyri harðskap. Kanska verða enn fleiri skuldsett, men tað er ikki avgjørt enn. Hetta sigur Georg Otthamar, ið er leiðari á kriminaldeildini, sum hevur havt hetta málið um hendi.

Støðan er hon, at nøkur av hesum ungu, ið framdu álopið, eru undir lágmarksaldurin, sum er 15 ár. Tey, ið eru undir 15 ár, kunnu ikki skuldsetast fyri hesa gerð, men tey, ið eru yvir 15 ár, verða skuldsett. Ákæruvaldið skal síðani taka avgerð, um ákæra skal reisast móti teimum skuldsettu.

Barnaverndin skal taka sær av teimum, ið ikki eru vorðin 15 ár enn. Barnaverndin tekur so avgerð um, hvat skal gerast við tey, ella um nakað skal gerast.

Øll, ið hava verið til avhoyringar, eru leyslatin aftur. Tey flestu eru ókend hjá løgregluni.

Georg Otthamar dugir ikki at siga, um rúsdrekka ella rúsevni høvdu ein leiklut í hesum álopinum.

# Løgreglan stendur á berum

**Náttina til leygardagin var ein tilburður, har ein 43 ára gamal maður varð álopin av teimum ungum dreingjum. Maðurin fekk álvarsligt kropsligt mein, men løgreglan stendur á berum og vil hava fólk at gera vart við seg**

HARÐSKAPUR
*Stefan í Skorini*

Stutt eftir midnátt fríggjakvøldið varð ein maður álopin av tveimum ungum dreingjum, sum eru í aldrinum 14-16 ár.

Maðurin búði á hotelli í Havn, og hann hevði lagt leiðina niðan í Sparikassan í miðbýnum, har hann skuldi hava reiðan pening úr sjálvtøkuni.

Staddur millum bygningin hjá Føroya Tele og sparikassan koma tveir ungir dreingir ímóti honum. Teir biðja hann geva teimum pening. Hann greiðir frá, at hann hevur ongan reiðan pening í lummunum. Uttan ávaring verður hann sligin niður.

### Misti vitið

Síðani verður hann sparkaður og sligin fleiri ferðir í búkin, ryggin og í andlitið, meðan hann liggur. Tann 43 ára gamli maðurin misti vitið beinanvegin. Tá hann raknar viðaftur, fer hann omanaftur á kamarið hjá sær. Dagin eftir fær hann vitjan av einum familjulimi, sum hevur frætt um støðuna, og hann verður síðani fluttur á landssjúkrahúsið.

Maðurin minnist lítið frá hesum kvøldinum, og hann fekk ikki tosað fyrstu tíðina, meðan hann var á sjúkrahúsinum. Tí var tað ein annar, ið boðaði løgregluni frá tilburðinum.

Nú hevur løgreglan tó havt samband við mannin, og hann upplýsir, at talan var um tveir dreingir í aldrinum 14-16 ár, ið framdu álopið.

Løgreglan hevur ikki avhoyrt nakran, ið kann kasta ljós á hetta málið. Tí verður heitt á fólk, ið halda seg hava sæð okkurt illgrunavert millum Føroya Tele og Sparikassan í miðbýnum stutt eftir midnátt, um at venda sær til løgregluna við upplýsingum.

# 5 kilo av hassji funnin



*Hundurin hjá tollvaldinum fann 5 kilo av hassji í einum bili, sum kom av Norrönu*

RÚSEVNI
*Stefan í Skorini*

Mánamorgunin fann tollvaldið 5 kilo av hassji í einum bili, sum kom í land av Norrønu. Rúsevnini vórðu fjald í eykahjólinum, ið hekk undir bilinum.

Hundurin hjá tollvaldinum lat tollararnar vita, at okkurt illgrunavert var í bilinum. Tí var hann tikin til nærri kanningar, og har varð hassj funnið.

Talan er um tveir danir, ið royndu at smugla. Ein kvinna, ið var 19 ára gomul, og ein maður, sum var síðst í 20-unum. Tey eru ókend í Føroyum og skuldu eftir øllum at døma bara lata onkrum føroyingi hassjið.

Tey bæði høvdu boðað frá, at tey skuldu vera í Føroyum í heilt stutta tíð. Tey eru handtikin og koma fyri rættin heilt skjótt.

5 kilo er ógvuliga nógv, sigur Kjartan Dam Joensen, ið er yvirtollari. Nøgdin hevur eitt virði uppá 625.000 krónur, um tað verður selt á gøtuni fyri 125 krónur fyri hvørt gramm.